# Granskarapark nú!

HANNES GISLASON
M.Sc. Ph.D., Granskingarleiðari á Fiskaaling



Føroya Løgting viðgjørdi eitt uppskot frá Vinnumálaráðnum um stovnsetan av eini granskarapark, sum tíverri datt burtur, tá val bleiv útskrivað. Marita Rasmussen, stjóri í vinnuhúsinum, Hans Pauli Joensen, vararektari á Setrinum, og Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum, mæla øll til at menna universitetið í Føroyum til altjóða støði. Annika Sølvará leggur afturat "at satsast skal eisini innan nýggj øki, og her er ætlaða granskaraparkin eitt upplagt stað at byrja". Hesum sjónarmiðum taki eg fult undir við.

**Endamál**
Granskaraparkin skal vera ein miðsavnandi karmur fyri granskarar frá universitetum og privatum fyritøkum, sum kunna leiga seg inn í granskaraparkina, og gera brúk av hølum og vísindaligum samstarvi, umframt at kunna brúka løgfrøðiliga og búskaparliga íverksetara-ráðgeving í granskaraparkini.

Endamálið við eini granskarapark er soleiðis at skapa eitt gott vitunarumhvørvi, har nýggjar fyritøkur kunna mennast í tøttum samstarvi við universitet, granskingarstovnar og aðrar vitunarfyritøkur. Hetta er eitt kent og vælumtókt fyribrygdi í fremstu OECD-londunum. T.d. vóru 180 granskaraparkir nærhendis universitetet í USA, Finnland hevði 22 og Danmark 7 granskaraparkir í 2004. Kelda: www.samband.is/files/1173514707Benedikt.ppt.

Vit eru tí ikki tey fyrstu í heiminum, men heldur eru vit ímillum tey seinastu, sum ætla at byggja eina granskarapark. Ísland hevur t.d. nýliga latið gjørt eina granskarapark á Akureyri, sum er samsvarandi býarstødd við Tórshavnar Kommunu.

**Gransking mennir vinnu**
Umframt gengransking eftir lógini um Ílegusavnið, er granskaraparkin ætlað at menna brúk av biokunning/kunningartøkni og biotøkni/aligransking, men onnur granskingarevni kunna eisini staðsetast í granskaraparkini.

Tílíkt arbeiði krevur góðar og framkomnar starvsstovur umframt vanligar skrivstovur og felagshøli til granskarar og onnur starvsfólk. Valið stendur ímillum at geva granskingini góðar karmar í Føroyum, ella at granskingin framvegis einamest verður gjørd uttanlands. Við hesari støðu missir føroyska samfelagið bæði vælútbúgving fólk, vitunararbeiðspláss og framtíðar vinnumøguleikar.

**Almenn gransking og vinnugransking**
Granskaraparkin verður opin fyri granskarum frá Fróðskaparsetrinum og øðrum granskingarstovnum, sum her kunna fáa munandi betri arbeiðsumstøður og vakstrarmøguleikar enn í verandi bygningum.

Granskaraparkin kemur ikki at forða menningini av verandi granskingarstovnum, men heldur tvørturímóti. Við eini sterkari granskarapark kann munandi størri ferð setast á granskingina í Føroyum, og hon kann gera at nógv fleiri granskarar og nýggjar fyritøkur kunna arbeiða og mennast í Føroyum, bæði innan gengransking og innan onnur fakøki. Granskaraparkin fer ivaleyst eisini at draga ein part av okkara besta tilfeingi heimaftur, teir vællærdu serfrøðingarnar, sum starvast uttanlands.

**Almenn og privat uppgáva**
Hvat er ein almenn og hvat er ein privat uppgáva broytist við tíðini, og í okkara tíð, er tað í alt størri mun stuðul til gransking og íverksetan, sum tørvar fyri at menna okkum fram á leiðina. Hetta hava tey skilt í EU, sum so dyggiliga stuðlar bæði almennari og privatari gransking og menning við nýggja rammuprogramminum FP7, umframt at EU-londini hvør í sær stuðla gransking og menning í nógv størri mun, enn vit gera tað í Føroyum.

**Niðurstøða**
Granskaraparkin skal hava góðar vakstrarmøguleikar, og samstundis ikki liggja ov langt frá universiteti og øðrum vitunarstovnum. Meinti nakar nakað við Visjón 2015? Granskarapark nú! Hon kann vera 1. byggistigið í menningini av føroyskari gransking.

# Dimma farin undir polittiska útspilling av Kára P. Højgaard?

JAN ASBJØRNSON JOENSEN
Form. Norðoya Sjálvstýrisfelag

Í Dimmu 11.januar var greinastubbi um ymsu flokkarnar nú tað stundar til vali.

Greinastubbin um Sjálvstýrisflokkin var ein long útspilling av formanni Sjálvstýrisflokksins, Kára P. Højgaard.

Vísandi til at Dimma so hátíðarliga undir slagorðinum "burtur við tøgnmentanini", til tíðir letst vilja hava eitt breiðari orðaskifti, og at vit ikki bert skulu tiga tá rímuligt er at siga- so loyvið eg mær við vanda fyri aftur at enda í Leiðaranum í Dimmu, at gera viðmerkingar til nevnda greinastubba.

**Sakligheit heldur enn persónliga útspilling**
Tað er í lagi at journalistar ikki hava serligan tokka til ávísar flokkar ella persónar, men eiga teir ikki at lata síni persónligu áhugamál fara í sjálvsving í grein, sum gevur seg út fyri at vera ein saklig analysa. Hetta hevur eisini týdning um miðulin sjálvur skal takast í álvara sum ein seriøsur, óheftur miðil.

Tað var eisini rímuligt um Dimma hevði gjørt sítt heimaarbeiði og gav sakligheit, heldur enn persónliga útspilling fyrstaplássi.

**Stór framgongd**
Dimma skrivar at leingi sá út til at Sjálvstýrisflokkurin við Kára P. Højgaard sum formanni, fór at doyggja út. Rætt er tað at leingi hevur skútan ligið tungt í sjógvinum, men Dimma tykist gloyma at tað er við Kára P. Højgaard handan róríð, at stór tilgongd er av nýggjum dugnaligum valevnum, sum í felag gera at Sjálvstýrisflokkurin stendur til stóra framgongd!

Dimma skrivar at stevnuskrá flokksins er góð, og millum annað byggir á andsfrælsi, Sjálvstýri, og kristnu siðalæruna.

Ì geinini verður Kári P. Højgaard lagdur undir at vera ein konservativur kristin afturhaldsmaður, sum forðar liberalum andsfrælsi og Sjálvstýrið, er dekan og næsadjarvt av Dimmu.

Tvørtur ímóti havið eg stóra virðing fyri hvussu væl formaðurin hevur duga at samansjóða síni kristnu virðir og Sjálvstýrishugsjónina. Tað er møguligt at Dimma ynskir at forbjóða kristnum at hava eina meining, tað hava tit rætt til, men hetta vil Sjálvstýrisflokkurin ikki.

**Onga meining- men sjálvstøðuga hugsan- ella?**
Dimma heldur síðan uppá at formaðurin onga meining hevur um nakað sum helst, tí hann atkvøddi blankt fyri einum meiningsleysum missálitisuppskoti hjá Tjóðveldisflokkinum á løgmann. Hetta var gjørt tá øll vóru vitandi um at stórur meiriluti var fyri løgmanni, og uppskoti tí tann beri glantrileikur.

Tað tykist ikki sum at Dimma minnist, at tá Kári P. Højgaard setti framm misálitisuppskot á fiskimálaráharran, grunda á niðurstøðu hjá einari samdari landsstýrismálanevnd- tá atkvøddi allir Tinglimir Tjóðveldisflokksins, saman við Miðflokkinum- blankt, og hava har við givið loyvi til at fisikimálaráði ikki hevur fyri neyðugni at tryggja at útlendingar ikki kunnu eiga meir enn 33% av føroyska fiskiflotanum.

**Sjálvstýrisflokkurin gongur undan**
Stór broyting! Nú gongur Sjálvstýrisflokkurin undanlegði sum tann fyrsti roknskap fram, og torir sum tann einasti at siga sína meining um Sandoyartunnilin.

Góða Dimma!

Hetta er alt púra rætt, men her haltar eitthvørt. Var tað ikki formaður Sjálvstýrisflokksins, við ongari meining, sum tann einasti Tinglimur, ið atkvøddi í móti uppskotinum um Sandoyartunnil? Er tað ikki formaðurin, Kári P. Højgaard sum hevur tikið avgerð um at leggja framm roknskap flokksins?

Ikki skal eg her ramsa upp hvat formaðurin hevur avrika, men hetta duga tit sum dugnalig fjølmiðlafólk sjálvið at finna fram- um tit vilja!

Eg skilji væl at Dimma óttast formann flokksins, serliga tá formaðurin tykist at hava tær dygdir sum greinaskrivarin sigur mangla. Soleiðis tykist greinastubbin meira verða ein tilætla niðurgerð av formanninum- kanska fyri at støðga tilgongdina til flokkin

Í Sjálvstýrisflokkinum hava vit bæði ands- og hugsunarfrælsi og hetta ætlað vit eisini at gera nýtslu av uttanflokka einsvæl og innanflokka, líkamikið hvør formaðurin er.

Vónandi kann Dimma, við tíðini seta sær sjálvum somu krøv, sum verða kravd av øðrum.

# Ein maður, sum bert hugsar um egnan persón hoyrir ikki heima í einum javnaðarflokki

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
Ingeborg Vinther



Í Dimmalætting tann 16. Januar 2008 hevur Heðin Mortensen eitt lesarabræv, har hann takkar fyri heilsanina frá mær.

Lesarabrævið hevur veruliga fingið ilt í Heðin, tí hann dittar sær m.a. at skuldseta undirritaða fyri at øvunda okkara eldru.

Hetta er tó einki eindømi frá einum politikara, sum alla politisku karrieru sína hevur hugsað um ein persón og tað er seg sjálvan.

**Føroya Arbeiðarafelag vil ikki hava kommununa at endurtaka misstøk síni**
Heðin Mortensen ger, honum líkt tað, at hann svarar lesarabrævinum frá FA soleiðis at lesarin skal fáa tað fatan, at Føroya Arbeiðarafelag ætlar at fáa kommununa at endurtaka misstøk síni, og at tað er øvundsjúka móti okkara eldru, sum hevur fingið felagið at skriva lesarabræv.

Hetta er ein beinleiðis snaran av veruleikanum, tí tað sum vit hava átala er, at Heðin Mortensen og samgonga hansara í Tórshavnar Kommunu ikki vilja viðgera eina umsókn á sakligum grundarlag, men royna at forða Føroya Arbeiðarafelag at gera eina lítla samanbygging av húsum felagsins, meðan kommunan í øðrum førum gevur loyvi til bygging, sum beinleiðis er í stríð við byggisamtyktina og at kommunan nakrar fáar metrar frá ognum okkara byggir ein risabygning.

Heðin Mortensen veit væl, at hvørki undirritaða ella limirnir í felag okkara øvunda teimum eldru, men Heðini líkt, so brúkar hann hesa skuldseting í lesarabrævi sínum, tí hann veit at hann ikki kann verja seg við veruligum grundgevingum.

**Heðin Mortensen vísir ongum aftur**
Heðin Mortensen vísir tó í veruleikanum ikki aftur nøkrum av tí, sum eg vegna felagið havi víst á í sambandi við málsviðgerð hansara.

Heðin veit, at hann hevur lovað Føroya Arbeiðarafelag at fáa avgreitt umsókn okkara, og hann veit, at tað var hann sjálvur, sum m. a. bað okkum um at søkja um at broyta byggisamtyktina, tí byggisamtyktin kortini skuldi broytast, nú kommunan skuldi byggja út Tjarnargarð, og hann sum bað okkum leggja matrikul nr. sama - vit kundi hildi áfram.

Sum vanligt er hetta tó bert tóm orð, hjá einum politikara, sum tykist at tosa øllum eftir munninum, men sum tá tað kemur til stykkið ikki kann halda tey lyfti hann gevur.

Alment roynir Heðin at síggja út sum tann ábyrgdarfulli politikarin, sum vil verja vanliga borgaran í landi okkara, so sæst at Heðin als ikki raðfestir tey gomlum, veiku og børnini frammalaga. Sum dømi síggja vit, at Heðin hevur tikið stig til stadion til frælsan ítrótt við ringvegin, alt gott um tað, men hvussu er við børnunum í barnagarðinum skamt har frá, sum mistu allan hava sín, og sum so at siga ongan garð hava at spæla í uttanum barnagarðin? Her hevur Heðin ikki tikið hædd fyri teimum sera óhepnum avleiðingum fyri bæði børn og starvsfólk, sum nú hava skerdar møguleikar at virka í dagligdegnum, men tað tykist Heðin ikki at taka sær av.

**Veljarin eigur at kenna hvør er veruligt javnaðarfólk og hvør kemur á politiskan lista bert fyri at royna at fáa makt**
Greitt man vera fyri flest øllum veljarum, at ein maður, sum rennur frá einum flokki til annan, ikki hevur nakra politiska hugsjón.

Tí eigur veljarin at duga at skilja millum verulig javnaðarmonnum og teir persónur, sum bert stilla upp á tí lista, har tað tænir teimum best, og tíverri mugu vit ásanna, at Heðin er hesin seinnu.

Eg taki undur við veruligum javnaðarpolitikki og teimum valevnum, sum umboða hendan politikk, men eg haldi ikki tað er rætt, at stilla upp á javnaðarlista, tá ein ikki hevur nakra javnaðarhugsjón.

Tórshavn, tann 17.01.2008